# Kjølurin til Norrønu lagdur

SKIPABYGGING

*Ingrid Bjarnastein*

Stóra og glæsiliga Norrøna, sum nógv hevur verið at hoyrt um, byrjar so smátt at verða til veruleika.

Nýggja Norrøna verður 155 metrar long, 27 metrar breið og kemur at viga umleið 30.000 bruttotons. Miðalferðin fer at vera umleið 22 sm/t og kemur hon at taka 1500 ferðafólk umframt manning.

Nýggja Norrøna verður bygd í blokkum, og verða tveir teir fyrstu blokkarnir lagdir mánadagin í næstu viku. Í hesum sambandi fara umboð fyri Smyril Line niður til Týsklands á skipasmiðjuna Flenderwerk í Lübeck í Týsklandi at vera tilstaðar tá fyrstu blokkarnir verða lagdir. Eftir ætlan skal nýggja Norrøna verða liðug í mars 2003, og vænta tey á Smyril Line, at tíðarætlanin kemur at halda.




*Soleiðis kemur nýggja Norrøna at síggja út, tá hon verður liðug í mars 2003*

*Myndir: Jens Kr. Vang*


## Starvsfólk til KT-deildina á Føroya Tele



"Ikki alt, sum kann teljast, telur – ikki alt, sum telur, kann teljast"

Albert Einstein

Føroya Tele hevur seinastu árini støðugt víðkað um talið av tænastum, sum vit bjóða kundum okkara. Tað hevur ført við sær stóran vøkstur í fjølbættinum av uppgávunum á KT-deild okkara. Ein vøkstur, sum vit vænta heldur fram komandi árini.

Fyri framhaldandi at kunna avgreiða uppgávurnar á besta hátt, søkja vit tí eftir einum nýggjum starvsfólki til KT-deildina.

KT-deildin tekur sær av kunningartøkni á Føroya Tele.
Tað vil siga stórir UNIX-servarar, Oracle-dátugrunnar/applikatiónir og mangt annað.

**KT-deildin arbeiðir eisini við**
- útvikling, menning og tillaging í samband við edv-búnað
- stýring av verkætlanum
- at greina tørvin fyri KT-skipanum og fáa røttu ætlanina setta í verk

Eisini er KT-deildin við í menningini av framtíðar strategiarbeiði á Føroya Tele, eins og deildin er miðdepil í arbeiðnum við at finna og seta í verk bestu arbeiðshættirnar í fyritøkuni.

Starvsfólkið, sum vit søkja eftir, skal hava hóskandi útbúgving sum t.d. verkfrøðingur, datalogur, cand. merc. dat. ella líknandi. Viðkomandi skal hava góðar menniskjans-ligar eginleikar og skal kunna virka aktivt í verkætlanararbeiði.

Royndir við einum ella fleiri av fylgjandi er ein fyrimunur:

- Verkætlanarstýringum
- Dátugrunnum (Oracle), Dba, tuning v.m.
- Fjarskiftisvinnu
- Oracle útviklingstólum
- UNIX-skipanum
- PL/SQL
- Búskaparfrøði og arbeiðshættum
- Java, Web-tøknifrøði

Nýútbúgvin eru tó eisini sera vælkomin at søkja. Føroya Tele skipar fyri neyðugum eftirútbúgvingum og skeiðum í Føroyum og uttanlanda.
Arbeiðsstaður er Føroya Tele í Tórshavn.

Starvið verður lønt eftir avtalu.

Eftir nýggjár letur Føroya Tele upp egnan integreraðan dagstovn í samstarv við Tórshavnar Kommunu, har starvsfólk á Føroya Tele hava framíhjárætt til ansingar-pláss.

Upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Michael Thomsen (mth@ft.fo) deildarleiðara á KT-deildini ella til Starvsfólkadeildina á tlf. 303030.

Umsóknir við avriti av prógvum og ummælum, skulu vera Føroya Tele í hendi í seinasta lagi mánadagin 21. januar 2002 og skulu sendast til:

**Føroya Tele**
Att.: Starvsfólkadeildin
Postsmoga 27
110 Tórshavn

Føroya Tele hevur, sum ein týðandi partur í føroyska samfelagnum, ábyrgdina av meginpartinum av fjarskiftisflutninginum í Føroyum. Menningin innan fjarskiftisøkið gongur sera skjótt, og hetta setur stór krøv til fyritøku og starvsfólk. Vit søkja tí eftir skikkaðum fólki, sum vilja verða við til at gera tað stuttligt at venda sær til Føroya Tele.

FØROYA TELE
*Skapið framtíðina saman við okkum!*




# Ein útbúgving sum kostar



*Eyðgunn Dam, sum lesur sálarfrøði í Ongland, heldur, at lesandi uttanfyri kongaríkið áttu at fingið meira í stundningi. Hóast hetta heldur hon á at lesa í Onglandi, men tað eru tó ikki nógvir føroyingar tilsamans, ið gera hetta*

**– Skalt tú fara undir hægri útbúgving í Onglandi, so mást tú gerast greiður um, at hetta fer at kosta nógv, sigur Eyðgunn Dam, sum í hálvtannað ár hevur lisið í Onglandi. Hóast tað er kostnaðarmikið, fær hon tó nógv burturúr**

ÚTBÚGVING

*Heri á Rógvi*

Eyðgunn Dam úr Vestmanna er ein teirra, sum hevur leitað sær útum kongaríkið fyri at nema sær hægri kunnleika. Eftir lokið stundentsprógv og nøkur ár sum arbeiðsfólk í heimbygdini, endaði hon í Preston í Onglandi. Ørindini vóru at lesa sálarfrøði á lærda háskúlanum í býnum.

Preston liggur ein góðan tíma frá Manchester og er partur av Lancaster økinum. Hóast tað er trupult at finna býin í føroyska atlasinum, so er talan um ein miðalhampa enskan bý, har tað eru nógv lesandi.

Millum teirra er eisini Eyðgunn úr Vestmanna, sum verður noydd at gjalda ein part av kostnaðinum fyri at ganga á skúlanum. Allíkavæl tímir hon ikki til Danmarkar at lesa, men heldur so avgjørt, at umstøðurnar kundu verið betri.

**Sálarfrøði**

Henda dagin í farna árið, tá kósin varð sett móti Vestmanna, var Eyðgunn heima í jólafrí. Skúlaárið í Onglandi eru munandi styttri enn tað eitt nú er í Danmark ella Føroyum. 32 vikur um árið fara til at lesnaði hjá teimum mongu bretunum og øðrum, ið stremba eftir meira lærdómi innan enska markið.

Sjálv lesur Eyðgunn sálarfrøði. Henda vísindin, sum seinastu árini hevur fingið meiri og meiri føroyingar til at lata eyguni upp fyri sær.

Sjálv sigur Eyðgunn, at hetta er ein vísind, sum hon leingi hevur havt stóran áhuga fyri. Hon valdi at royna seg, og higartil hevur henni hesi eisini dáma bara heilt væl.

Hon greiðir frá, at á skúlanum, so verður tað eitt nú ikki talað eitt orð um Freud og hansara ástøði, har kynsliga driftin spælir høvuðsleiklutin. Heldur eru tað aðrir sálarfrøðingar og aðrar ástøðir, ið Eyðgunn lesa og læra um.

Sjálv hevur hon ongar ætlanir um sita í stólinum og lurta eftir fólki hvønn dag, sum er tann vanliga ímyndin av einum sálarfrøðingi. Hon kundi heldur hugsað sær at arbeitt innan fyri tann meira uppklárandi partin av sálarfrøðinum, har arbeitt verður við lógarbrótarum og tílikum.

## Trupult

Um tað at fara undir eina útbúgving í Onglandi sigur Eyðgunn, at tað er rættiliga trupult at koma ígongd. Tað er eitt sindur torført at sleppa inn, men tað mest truplar var, at hon noyddist at gera so at siga alt fyrireikingaarbeiðið sjálv. Serliga fílist hon á, at tað var ógvuliga lítið, sum føroysku myndugleikarnir vistu at siga henni og hjálpa henni við.

Í samstarvi við skúlan fekk hon skipað soleiðis fyri, at hon slap avstað, og hon hevði okkurt at búgva í, tá ið hon kom. Hetta við bústaðinum var tó bert nakað, ið skúlin syrgdi fyri fyrsta árið. Nú hon hevur gingið eitt ár á skúlanum ella tvey semester, so varð sjálv noydd at finna okkurt at búgva í.



*– Rokningin er har, tá ið tú ert liðug, men við at lesa her, so ført málið og útbúgving í einum, sigur Eyðgunn Dam at enda*

Hon hevur fingið sær eina lítla íbúð, sum liggur rættiliga væl fyri í býnum.

Eyðgunn sigur, at hon varð so at siga blakað beint inn í skipanina, tá ið hon kom til Onglands. Hon hevur havt ein lestarvegleiðara, sum hevur hjálpt henni við nøkrum tingum, og hesir eru altíð til reiðar at hjálpa nemingunum.

Sjálvt tað málsliga er ikki so trupult, sum ein kanska kundi hugsað sær. Bøkurnar eru sjálvsagt allar á enskum, men hetta er ikki nakar serligur trupulleiki heldur. Tað verður nógv nýtt latín og nógvur statistikkur verður tikin fram, so tað er heldur her, at avbjóðingarnar liggja í so máta.

Sum tað oftani er á lærdum háskúlum, er tað fyri tað nógva fyrilestar, har luttakaratalið er ógvuliga høgt.

Útbúgvingin er bygd upp við einari bachelor útbúgving fyrst, sum tekur 3 ár, og síðani kann ein yvirbygningur leggjast omaná. Hetta er fyri so vítt tað sama, sum vit kenna úr Norðanlondum.

Sum vera mann á tílíkum støði, so er tað rættiliga nógv at gera. Eyðgunn og hinir nemingarnir hava úr at gera við at lesa, og uppgávur verða skrivaðar mestsum hvørja viku, og hesari eru rættiliga umfatandi.

Sum heild er tað nógv øðrvísi á donskum lærustovnum. Eitt nú karakterskalain er heilt ørðvísi og byggir á prosent.

Reint sosialt stórtrívist Eyðgunn í Preston. Hon hevur vant seg við at búgva í Onglandi, og hon hevur fingið fleiri vinir og pubmentanin er ikki ókend fyri henni.

Fíggjarliga er talan um eina heilt aðra søgu, tí har er tað trupult at fáa endarnar at røkka saman.

8.5000 pund ella umleið 102.000 kr. skal hon gjalda fyri skúlagongdina. Umframt at hon eisini skal av við leigugjald fyri íbúðina og skúlatilfarið.

60.000 kr. koma úr Føroyum til skúlagjald, umframt 4.000 kr. um mánaðin úr Danmark.

Hetta heldur hon vera alt ov lítið, og neyðugt hevur verið hjá henni at taka eitt lestrarlán. Varð hon innskrivað sum ES-borgari, so hevði skúlagongdin verið ókeypis.

– Rokningin er har, tá ið tú ert liðug, men við at lesa her, so ført málið og útbúgving í einum, sigur Eyðgunn Dam at enda.


D. B. Bilar
brúktbilalisti

KIA Sephia II 1,5 Sedan De Luxe
bláur met., árg. februar 2001, km. 11.000
Kr. 135.000

Peugeot 106
reyður, árg. november 94, km. 78.000
Kr. 56.000

Daihatsu Charade Turbo Diesel
silvur met., árg. mars 94, km. 101.000
Kr. 58.000

Daihatsu Charade Turbo Diesel
silvur met., árg. juni 93, km. 120.000
Kr. 54.000

Daihatsu Applause 1,6 Hatchback
reyður, árg. august 95, km. 75.000
Kr. 55.000

Kia Clarus 1,8 SLX
blátt met., árg. oktober 97, km. 38.000
Kr. 108.000

Daihatsu Cuore 1,0 Lux. model
silvur met., árg. september 2000, km. 7.600
Kr. 98.000

Kia Pride GL Stationcar
silvur met., árg. februar 2000, km. 27.000
Kr. 85.000

Volvo 240 GL
koksgrá met., árg. november 87, km. 198.000
Kr. 30.000

Subaru Legacy 1,8GL Stationcar
sandlitt. met., árg. november 91
Kr. 45.000

Daihatsu Charmant 1,3 LC
blágrá met., árg. februar 86
Kr. 12.000

Rover 420 2,0 v/ leður, cruise con.
grønur met., árg. juni 97, km. 93.000
Kr. 135.000

Kia Pride 1,3 GL Sedan
koksgrá met., árg. november 97, km. 20.800
Kr. 58.000

Daewoo Nubira 1,6
silvur met., árg. desember 96, km. 24.000
Kr. 108.000

D. B. Bilar
J. Bronckegøta 15 • Boks 1079
Tel. 31 06 00 • Fax 31 06 50